**Tórshavn, tann** 14. oktober 2003
**J.Nr.:** 20030359-3 / 110
**Viðgjørt:** HW/KM

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 5 / 2003: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 100 frá 8. august 2003, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 8 verður aftaná stk. 7 sum nýtt stykki sett:
"*Stk. 8.* Veiðiloyvi kann verða flutt sambært ásetingunum í hesi grein, hóast fiskifarið er lagt med alla, er ella hevur verið ræðisavmarkað, ella farið er strikað í skipaskránni."
Stk. 8 verður hereftir stk. 9.

2) Í § 8, stk. 8, sum verður stk. 9, verður "1-7" broytt til: "1-8".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Í einum kærumáli viðvíkjandi veiði- og fiskirættindum hjá einum ávísum skipi (j.nr. 7.13-20030001) hevur landsstýrismálanevndin sátt iva, um Fiskimálaráðið hevði heimild at lata eigara flyta veiðiloyvi yvir á eitt fiskifar, sum er farið úr fiskiflotanum sambært ásetingunum í § 8. Tað vil siga, at ivi varð sáddur um eitt fiskifar, sum einaferð er farið út, fyri at annað kundi koma inn aftur í føroyska fiskiflotan.

Fiskimálaráðið hevur havt ta fatan, og hevur siðvenjan eisini verið soleiðis tey seinnu árini, at hóast eitt fiskifar einaferð hevði fingið eina ræðisavmarking um t.d., at tað ongi fiskirættindi longur hevði, tí at veiðiloyvið var flutt yvir á annað fiskifar, so merkti tað kortini ikki, at tað ræðisavmarkaða fiskifarið ikki kundi koma aftur í flotan. Treytin var bert, at tað fiskifar, sum veiðiloyvi var flutt frá, samstundis varð ræðisavmarkað ella varð strikað í skipaskránni. Hetta hevur verið framt lutvíst út frá rættarsiðvenju, og at tað í ásetingunum í § 8 ikki sæst vera forboð ímóti hesum. Tað kann í hesum sambandi eisini viðmerkjast, at tað er Fiskimálaráðið, sum er tilmeldari av skjalinum viðvíkjandi ræðisavmarking, og er tað tí Fiskimálaráðið, sum kann kalla aftur eina ræðisavmarking.

Eftir at hesin ivi varð sáddur í nevnda kærumáli í landsstýrismálanevndini, hevur landsstýrismaðurin gjørt av at steðga viðgerð av líknandi málum, og eru tað tí nøkur mál, sum nú bíða eftir at verða avgreidd.

Til tess at sleppa undan ivamálum skjýtur landsstýrismaðurin tí upp, at ein áseting verður sett inn í § 8 soleiðis, at tað hereftir positivt verður sagt í § 8, stk. 8, at hóast eitt fiskifar er lagt med alla, er ella hevur verið ræðisavmarkað, ella strikað í skipaskránni, so kann veiðiloyvi flytast yvir á viðkomandi fiskifar, um treytirnar í lógini annars eru loknar. Núverandi stk. 8 verður flutt til stk. 9.

Tað hevur verið frammi í kjakinum, um tað yvirhøvur er neyðugt við ræðisavmarkingum á fiskifør við tað, at tey rættindi, sum eigari av fiskifari til eina og hvørja tíð hevur, eru ásett í teimum loyvum, sum Fiskivinnustovan gevur eigaranum. Tað er rætt, at verður veiðiloyvi flutt frá einum fiskifari yvir á annað, so er tað fiskifarið, sum loyvið er flutt frá, ikki fiskifar longur sambært skipaskrásetingarlógini. Men ein ræðisavmarking kann eisini merkja, at fiskifar við einum nýggjum loyvi, t.d. innan rækjufiskiskap ella til veiðu eftir uppsjóvarfiskasløgum, kann fáa meiri avmarkað rættindi, enn onnur fiskifør av líknandi slagi hava. Eitt annað sjónarmið hevur verið, at við tað, at ein ræðisavmarking er skrásett á skipsblaðið hjá fiskifarinum, so gevur hetta størri gjøgnumskygni mótvegis borgaranum.

Tað kann tó viðmerkjast, at landsstýrismaðurin hevur sett í verk, at lógin um vinnuligan fiskiskap í síni heild verður gjøgnumgingin og dagførd, og verður uppskot um hetta seinni í hesum árinum, ella fyrst í komandi ári, lagt fyri Løgtingið, og verða tá hesir spurningar viðgjørdir út frá eini samlaðari meting.

**Ummæli**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, sum tekur undir við uppskotinum.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Uppskotið ber ikki í sær nakra broyting av verandi siðvenju, og hevur tískil ikki fíggjarligar ella fyrisitingarligar avleiðingar við sær.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri Vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Ætlanin er ikki, at broyting skal verða í mun til ta siðvenju, sum hevur verið, men at talan verður um positivt at seta inn sum nýtt stk. 8 í § 8, at heimild er fyri, at hóast eitt fiskifar er lagt med alla, er ella hevur verið ræðisavmarkað, ella er strikað í skipaskránni, so merkir hetta ikki, at tað ikki aftur kann koma í fiskiflotan, tó treytað av, at veiðiloyvi kann flytast yvir á fiskifarið, og at aðrar treytir í lógini annars eru loknar.

Vælvitandi, at skip uttan veiðiloyvi verða skrásett sum stuttleika- ella handilsskip sambært løgtingslóg um skipaskráseting, verður terminologi í lógini um vinnuligan fiskiskap fylgd, tvs. orðið "fiskifar" verður nýtt.

**Til § 2**
Ígildissetan.

Fiskimálaráðið, 14. oktober 2003

Jacob Vestergaard (sign.)
landsstýrismaður

/

Kaj P. Mortensen (sign.)
aðalstjóri